Tidy Car:

# Effektiv viðgerð eftir ein harðan vetur

**Ein bilur sum hevur fingið eina Tidy Car viðgerð, bæði uttan og innan, verður sum nýggjur og fær munandi hægri søluvirði. Í Føroyum verða millum 70 og 100 bilar Tidy Car viðgjørdir um mánaðin**

TIDY CAR
*Magnus Gunnarsson*

Bilarnir í Føroyum blíva munandi skitnari enn t.d. í Danmark, bæði uttan og innan. Serliga eftir ein harðan vetur.

Hóast ein bilur er vorðin mattur í lakkinum, skitin innan og luktar illa av t.d. mjólk ella fiski, er tað eingin trupulleiki. Eftir eina Tidy Car viðgerð verður hann sum nýggjur aftur. Á teimum bilum sum verða viðgjørdir innan, er ofta neyðugt at taka setrini úr og hátrýstreinsa tey.

Eftir at alt er reinsað, verða setrini, hurðabetrekkini og gólvteppini impregneraði soleiðis at inntrekkið tolir meira av, og bilurin luktar sum nýggjur innan, hóast hann luktaði av mjólk ella fiski, áðrenn hann kom til viðgerðina. Til viðgerðina uttan verða brúktar sergjørdar maskinur, sum reinsa lakk, plastikk og krom sera effektivt. Bilurin verður poleraður soleiðis, at skeinur og skøvur verða slípaðar burtur, og lakkið verður skínandi blankt.

Ein Tidy Car viðgerð uttan og innan tekur upp til 3 dagar. Úrslitið verður ein skínandi blankur bilur, sum kann standa seg ímóti øllum veðri.

Ein brúktur bilur, sum hevur fingið eina slíka viðgerð, fær munandi hægri søluvirði og verður lættari at selja. Tidy Car er eitt amerikanskt produkt, og alt tilfarið kemur hiðani.




*Skylv Hartvigsson er leiðari á Tidy Car deildini hjá Reyni Service*

SUZUKI LIANA 1,6
Ein rúmligur familjubilur við nógvari útgerð, so sum:
169.500,-
Aircondition
Alufelgur
Hiti í setrunum framman...



www.suzuki.fo
Spf. Eyðbjørn Hansen Bilasøla og Verkstaður
Varðagøta 75 • FO-100 Tórshavn • Tel. 313375 og 213375 • Fax 31 14 95
Heimasíða: www.suzuki.fo • E-mail: suzuki@suzuki.fo • Opið er mánad. - fríggjad. kl. 08.00-16.10

## Suzuki Liana 1,6

Motorurin
1,6 litur 4 syl. bensin 103 hk

0-100 km/t
11,7 sek

Bensinnýtsla 14,5 km/l

Støðd og vekt
Longd 423,0 cm
Breidd 169,0 cm
Hædd
155,0 cm
Eginvekt 1125 kg
Viðførisrúm
295 litrar

Prísur
kr. 169.500,-

Søluumboð
Sp/f Eyðbjørn Hansen

Varðagøta 75
FO-100 Tórshavn
Tel. 313375/213375

Teldupostur: suzuki@suzuki.fo
Heimasíða: www.suzuki.fo






*Daewoo Evanda er ein stórur bilur í støðd við Ford Mondeo og VW Passat. Uttan fyri Evropa eitur bilurin Daewoo Magnus*

P/F Esmar Simonsen:

# Tríggir nýggir Daewoo á marknaðin í ár

**Eftir at lítið hevur verið at hoyrt um Daewoo bilarnar í eina tíð, sær tað út til, at nú er nakað við at henda. Tríggir nýggir bilar koma á marknaðin í ár, teir eru Kalos, Evanda og ein nýggjur Nubira. Tann minsti Daewoo, Matiz, fæst nú eisini við 1.0 litur motor við 64 hk**

BILAR
*Magnus Gunnarsson*

Eftir nøkur ár við óvissu um framtíðina hjá Daewoo, verður koreanska verksmiðjan nú stýrd av General Motors. Við hesum samstarvi byrjar ein nýggj tíðarrokning hjá Daewoo. Nýggja felagið eitur GM Daewoo Auto & Technology Company.

Samstarvið við GM sæst longu í ár. Ikki minni enn trý nýggj bilmodell koma á marknaðin í hesum árinum.

Fyrsti bilurin í nýggja samstarvinum er Daewoo Kalos, ið er teknaður av italska bildesignaranum Giugiaro. Talan er um ein bil í umleið somu støðd sum t.d. Citroën C3 og Skoda Fabia við smartum og nútímans linjum.

Motorurin er ein 1,4 litur 4 syl. bensin við 83 hk. Bilurin kemur í fyrstu atløgu sum hatchback við 5 hurðum, seinni kemur ein útgáva við 3 hurðum og ein sedan.

Umframt Kalos kemur ein heilt nýggjur Daewoo Evanda, ið avloysir tann størra Daewoo Leganza. Tað er ein bilur í støðd við Ford Mondeo og VW Passat. Evanda er størri enn Leganza og er ein luksusbilur við hópin av útgerð sum standard. Motorurin er ein 2.0 litur við 131 hk. Kalos og Evanda eru á veg til Føroyar og verða her í komandi viku. Teir verða eisini at síggja á bilasølustevnuni í Klaksvík frá 10.- 11. mai . Kalos kemur at kosta umleið 120.000 krónur og prísirnir á Evanda byrja við uml. 230.000 krónum. Triði nýggi Daewoo er ein nýggjur Nubira sum kemur seinni í ár.



Talan er um ein heilt nýggjan sedan við 4 hurðum, sum fæst við tveimum motorstøddum: 1,6 litur við 109 hk og 1,8 litur við 122 hk. Tann minsti Daewoo, Matiz, fær nú størri motor. 0,8 motorurin við 3 syl. og 51 hk, verður nú skiftur út við ein 1,0 litur 4 syl. motor við 64 hk. Bilurin vigar uml. 800 kg. Bíligast Matiz kostar í dag einans 106.500 krónur. Jens Petur Jensen, sølumaður hjá P/F Esmar Simonsen, væntar sær nógv av nýggju Daewoo bilunum, sum verða kappingarførir í prísi, útgerð og dygd.



*Daewoo Kalos. Ein nýggjur bilur sum í fyrstu atløgu kemur sum hatchback við 5 hurðum og 1,4 litur motori við 83 hk*